

*Kendasta kriminalmyndin nakrantíð. Løgreglan loraði eitt myndatól niður gjøgnum eitt av holunum í hválvloftinum og tók hesa myndina. Teir tríggir kvinnuligi gíslarnir sita hjartkyptir saman, meðan Clark Olofsson júst kemur til sjóndar*

seinni verður kent sum Stokkholmsyndromið – góðkenslan hjá gíslanum fyri gíslatakaranum.

Ímeðan gongur Clark Olofsson runt í hválvinum og syngur uttan íhald sangin hjá Robertu Flack, »Killing me Softly«.

Nú tekur løgreglan eina av løgnastu avgerðunum undir øllum Norrmalmstorgdramainum, nevniliga at avbyrgja ránsmeninar og gíslarnar í hválvinum. Hetta økir intensitetin munandi og førir til, at Janne Olsson við jøvnum millumbilum leggur snarur um hálsin á gíslunum.

Hann tosar við gíslarnar um, hvør teirra skal doyggja fyrst. Sven Säfström roynir at verja lívið hjá kvinnunum og setur upp á, at ránarin skal skjóta hann fyrst.

## Yvirlivilsisstrategi

Clark Olofsson verður sagdur at vera hann, sum kølir niður støðuna gjøgnum tey seks døgnini, tey eru forskansað í hválvinum, við einari ruskspann í eina horninum, at gera tað neyðuga av sær í.

Fjórða dagin hoyrist eitt skurrandi ljóð inni í hválvinum. Løgreglan er byrjað at bora. Knappliga verður bølamyrkt, ein leidningur er kvettur av.

Tá hol er komið í, lorar løgreglan eina battarí lampu niður í hválvið. Telefonin ringir, Sven Säfström tgekur hana og skrálar:

- Hvat tit so gera, gassið okkum ikki!

Janne Olsson bindur snarur og hongur í bankaboksirnar. Við jøvnum millumbili leggur hann tær um hálsin á gíslunum.

Gjøgnum holið í loftinum lorar løgreglan eitt myndatól niður og tekur eina mynd. Hetta verður til svenska kriminalsøgu og er mest sannlíkt ein av heimssøguni best dokumenteraða mynd av einum brotsverki.

Deyðaræðslan í eygunum á gíslunum og staranin av Clark Olofsson beint inn í myndatólið, sigur alt um støðuna í hválvinum.

Mánadagin lorar løgreglan mat og øl niður í hválvið, øl við svøvnevni í. Men tað varnast Janne og Clark beinanvegin.

Gíslar og gíslatakarar eru nú sjóðað væl saman móti tí, sum tey uppfata sum eina felags hóttan – løgregluni. Stokkholmsyndromið verður skapt og verður eitt heiti í psykiatriini. Mest ítøkiligu frágreiðingina hevur Kristin Enmark sjálv givið í einari samrøðu 20 ár seinni:

- At søkja samskiljan í einari kroystari støðu er ikki so undarligt – tað er ein yvirlivilsisstrategi.

## Dramaið endar

Týsdagin, dag seks, skal dramaið enda. Borað verður av øllum alvi, og ljóðið í hválvinum er øgiligt. Janne Olsson skýtur eitt skot gjøgnum eitt av holunum, tá løgreglumaðurin, Olle Abrahamsson, skal leggja út yvir skottrygt glas, fyri á tann hátt at gera hetta til eitt trygt hyggihol. Hann verður raktur í hondina og kjálkan, og yvirlivir bert tí hann hevur marginalarnar á sínari síðu.

Eftir hetta sprænir løgreglan inn gass. Teir hava fingið abolitión frá stjørnini. Tað merkir, at teir, um teir meta tað neyðugt, kunnu skjóta og drepa Janne Olsson og Clark Olofsson, uttan aftaná at skula forklára seg ella risikera rættarligt eftirspæl.

Eitt róp hoyrist inni í hválvinum.

- Vit yvirgeva okkum. Tramin í hatta gassið.

Løgreglumenninir Håkan Larsson og Johnny Johnsson eru servandir til uppgávuna. Báðir eru til reiðar at storma inn í hválvið og skjóta frá hond við teimum til endamálið avsagaðu høglbyrsunum. Men teir eru róligir. Teir krevja, at gíslarnir koma út fyrst.

Kristin Enmark vil ikki koma út at byrja við, hon er rædd fyri, at løgreglan skal fara illa við Clark Olofsson. At enda koma gíslarnir tó út.

Teir báðir løgreglumenninir fara síðani inn í hválvið, binda Janne Olsson fastan millum sín við handjørnum og renna út við honum. Seinni siga teir, at hetta varð gjørt fyri at bjarga lívinum hjá Janne Olsson, tí tað vóru fleiri løgreglumenn, sum fegnir høvdu dripið hann.

Úti á Norrmalmstorginum snara teir runt sum eitt slag av uppvísningi fyri miðlunum.

Sagt verður, at Kristin Enmark fleiri ferðir seinni skal hava hitt Clark Olofsson.

- Vit hava hitst av og á. Eg kenni hansara familju og hann mína, hevur hon greitt frá í einari samrøðu.

Rætturin dømdi Clark Olofsson seks og eitt hálvt ára fongsul fyri meðvirkan tá mett var, at hann inni í hválvinum fór í part við Janne Olsson. Men málið var torskilt. Hann varð jú førdur til bankan í hondjørnum av løgregluni eftir boðum frá stjórnini.

Blaðmaðurin, Roland Aldeheim, gjørdi 20. mars 1974 viðmerkingar til dómin í Expressen undir yvirskriftini »Clark burdi longu verið frælsur maður«:

»Við hastiligu og oyðandi avgerðini hjá stjórnini hevur Clark Olofsson gjøgnum bankadramaið og eftirfylgjandi dóminum heilt óneyðugt mist enn eitt ár av sínum dýrabæra lívi«.

Svea høvuðsrættur fríkendi seinni Clark Olofsson heilt.